# Læra seg at ansa minnisveikum

**Alzheimerfelagið hevur alla vikuna skeið á Hotel Vágum, har luttakararnir fara at læra, hvussu tey skulu fara um minnisveik. Luttakarar eru frá øllum røktarheimum og økjum hjá Heimarøktini kring landið**

SKEIÐ
*Edvard Joensen*

**Hotel Vágar:**
Tey verða eini 20 fólk á skeiði hjá Alzheimerfelagnum á Hotel Vágum. Fólk eru komin úr Danmark at undirvísa teimum, sum í Føroyum ansa og fara um minnisveik fólk. Kravið til luttøku á skeiðinum er júst, at fólk skulu arbeiða við minnisveikum.

Í tíggju ár hevur skúlin Omsorgsorganisationernes Samråd í Svendborg undirvíst fólki, sum ansa minnisveikum, greiðir Sigrun Mohr Hermansen, formaður í Alzheimerfelagnum, frá. Tríggir føroyingar hava verið á skúlanum í Svendborg. Nú hava tey so valt at fáa undirvísarar hendanveg, soleiðis at enn fleiri føroyingar kunnu fáa hendan kunnleikan.



*Sigrun Mohr Hermansen, formaður, Sofus Joensen, nevndarlimur, og Erna Háberg, skrivari í Alzheimerfelagnum, eru millum luttakararnar á skeiðnum, sum felagið skipar fyri á Hotel Vágum í vikuni*

Talan er um undirvísing í timum umførum, greiðir skrivarin í Alzheimerfelagnum, Erna Háberg, frá. Tað fyrsta verður nú í vikuni. Síðan verður aftur eitt í november og eitt endaligt í februar næsta ár. Millum tey bæði seinnu »modulini«, sum tey nevna tað, í november og februar, skulu luttakararnir gera eina sjálvvalda skrivliga verkætlan, greiða tær frá.

Saman við okkum situr eisini nevndarlimurin í Alzheimerfelagnum, Sofus Joensen, yvirlækni.

Hann veit at siga, at talið á sjúklingum við Alzheimer í Føroyum man liggja umleið tey 900 - 1.000. Neyv hagtøl finnast ikki, sigur hann, men eftir sum roknað verður við í øðrum londum, har sagt verður, at eini sjey prosent av fólkinum yvir 25 ár hevur einhvønn ferðil av Alzheimer, er komið fram til tað talið. Roknað verður eisini við, sigur Sofus Joensen, at tað verða staðfestir 157 nýggir tilburðir árliga í Føroyum.

Eitt, sum stórur dentur veðrur lagdur á í Alzheimerfelagnm, sigur Sigrun Mohr Hermansen, er, at fáa gjørt lógarverk á økinum.

Slíkt lógarverk finst í Danmark, men hjá okkum er tað heldur ógreitt, heldur hon.

Sum partur av skeiðnum á Hotel Vágum hesa vikuna, verður hetta evnið eisini tikið upp. Har fara danskir serfrøðingar saman við millum øðrum føroyskum embætisfólki at viðgera evnið.

Alzheimerfelagið í Føroyum er tvey ár júst í hesum døgum. Felagið hevur umleið 180 limir. Tey flestu eru avvarðandi at minnisveikum fólki og fakfólk, sum arbeiða við minnisveikum, sigur Sigrun Mohr Hermansen.

## Harðskapur og rúsdrekkakoyring

**Løgreglan hevur ikki fingið so nógvar fráboðanir um vikuskiftið, men ein maður varð tikin fyri harðskap, og nakrir tilburðir av rúsdrekkakoyring vóru eisini**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Sunnunáttina fekk løgreglan í Havn eina fráboðan um, at tveir mans vóru farnir til hendurs. Annar maðurin var fluttur á skaðastovuna, tí hann bløddi úr munninum og annað eygað var hovið. Talan var tó ikki um nakað heilt álvarsligt, men hin maðurin varð tikin og verður skuldsettur fyri harðskap.

Nakrir tilburðir av rúsdrekkakoyring hava somuleiðis verið í høvuðsstaðarøkinum um vikuskiftið. Ein bilførari varð steðgaður í Kaldbaksbotni seinnapartin fríggjadagin. Hann varð steðgaður, tí hann hevði ov nógva ferð, men ein blóðroynd staðfesti so eisini, at bilførarin var ávirkaður. Hesin kann tí vænta at missa koyrikortið.

Tveir aðrir bilførarar vórðu steðgaðir í Niels Finsensgøtu ávíkavist leygardagin og sunnudagin. Báðir fyri rúsdrekkakoyring, og báðir kunnu vænta sær eina heilsu frá fútanum.

Annars sigur vakthavandi, at tað hava verið aðrar smávegis fráboðanir, men sum heild má hetta sigast at hava verið eitt av teimum friðarligu vikuskiftunum.

Løgreglan í Klaksvík og Runavík fingu ongar fráboðanir hetta vikuskiftið.

†

Kunngjørt verður, at elskaða mamma, vermóðir, omma og langomma okkara

**ELINA B. SIMONSEN**
**Norðradalur**

andaðist í heiminum fríggjdagin 12. september, 79 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin 17. september kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**børnini**

## Ferðavinnustevna í Havn

**Ferðavinnustevnan Vestnorden Travel Mart er í Havn um dagarnar. Eini 400 fólk luttaka á stevnuni**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Árliga ferðavinnustevna í Útnorði, Vestnorden Travel Mart, varð sett á Forngripasavninum í Hoyvík í gjár. Tað var stjórin á Ferðaráði Føroya, Heri Niclasen, sum setti stevnuna.

Hóast stevnan verður hildin á hvørjum ári, er hon bara fjórða hvørt ár í Føroyum. Annaðhvørt ár verður hon hildin í Íslandi, og annaðhvørt ár skiftast Føroyar og Grønland um stevnuna. Tankar hava verið frammi um at víðka økið til eisini at umfata um Hetland og kanska onnur øki við.

Umleið 350 fremmandir gestir frá útlendskum ferðavinnufeløgum fara at luttaka á stevnuni í ár.



*Heri Nicasen, stjóri á Ferðaráði Føroya setti Vestnorden Travel Mart 2003 í gjárkvøldið*

Eisini einir 30-40 føroyingar í vinnuni vera við, umframt at tíðindafólk og onnur innboðin eisini fara at luttaka, greiðir Heri Niclasen, stjóri á Feðraráðnum, frá. Tilsamans fer talið at liggja umleið tey 400 fólkini.

Stevnan er ikki almenn, men verður hidlin fyri teimum, sum beinleiðis hava við ferðavinnuna at gera og annars hava boðað frá luttøku.

Sjálv messan verður í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn, har keyparar og seljarar úr mestsum øllum Europa og eisini nakað væl av amerikanarum fara at hittast, sigur Heri Niclasen.

Gestirnir búgva á hotellum í Havn, umframt at Norrøna eisini liggur á Havnini sum hotelskip hesar dagaranar, stevnan er.

Vestnorden Travel Mart heldur fram til eftir middag í morgin. Í dag fer Eyðun Elttør, landsstýrismaður við umhvørvismálum, at kunngera á stevnuni, hvør bygd er vald sum best hildna bygd í Føroyum í 2003.



# Framúr døgurði hjá Føroysku Sjómanskirkjuni

SJÓMANSKIRKJAN
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Lagt upp var til tað heilt stóra sunnudagin, tá Sjómannskirkjan helt gudstænastu í Glyvrakirkju og stóran døgurða fyri innbodnum aftaná. Sjómanskirkjan hevur 20 ár á baki, og nógv er hent innan hesi 20 ár og seinasta er, at kirkjan nú hevur fingið egnan prest settan í Hull og hon eitur Hjørdis Kjærsgaard. Og tað var júst tað sum eisini skuldi hátíðarhaldast.

»Tíðin rennur sum streymur í á« ljómaði sum fyrsti sálmur í Glyvra Kirkju og kórið var fult av prestum, sum vóru komnir til hátíðargudstænastuna. Í dag skuldi teir bara sita afur á lurta og deknar teirra gjørdu arbeiðið heima í sóknini. Yvirhirðin í fólkakirkjuni Hans J. Joensen, biskupur talaði úr kórinum. Hann greiddi frá, hvussu Sjómanskirkjan varð stovnað og fegnaðist um, at Hull var kosin sum fyrsti býur, har føroyskur sjómansprestur skuldi virka. Bispur kom inn á viðurskiftini millum Føroyar og stóra grannan fyri sunnan og hvussu hesi viðurskiftust mentust við ferð, tá seinni heimsbardagi brast á. Hann ynskti føroyska sjómansprestinum signing við nýggja starvinum. Bispur takkaði stovnaranum av tí føroysku sjómannskirkjuni Henning Bøgesvang, sjómansprésti í Gøteborg fyri arbeiði. Hann takkaði eisini Ronald Petersen, aðalskrivara í Donsku Sjómanskirkjuni fyri gott samstarv seinastu mongu árini. Og so takkaði hann Ólavi Rasmussen, presti, fyri at vera stigtakarin til at fáa ein føroyskan sjómansprest út í heim at arbeiða sum føroyskur sjómansprestur. Ólavur Rasmussen var ikki sjálvvur hjástaddur.

Hjørdis Kjærsgaard, sum er hálvur føroyingur, prædikaði á føroyskum, og væl lá fyri. Hon er góður predikantur og teksturin var ikki av teim léttastu, serliga fyri prestar. Tí dagsins tekstur var um tann miskunnsama samáriubúgvan og tað var júst ein prestur, sum var tann fyrsti at ganga fram við hesum illa fyrikomna og særda ferðamanni. Hann



*Sungið varð, áðrenn farið varð undir forrættin*

Mynd: *Jústinus Leivsson Eidesgaard*

*Framhald á síðu 13*

